MIÐFLOKKURIN

**hvørt vikuskifti í Sosialinum**

- **Virðiligur**
- **Tryggur**
- **Grundfestur**

**Miðflokkurin sjálvandi**



Elin Norðberg Wenningsted Tausen

## Profilurin

**Navn:** Elin Norðberg Wenningsted Tausen

**Aldur:** 34

**Starv:** Lesandi

**Familjuviðurskifti:** Gift við Hans Tausen, eiga Marna 13 ár, Martu 10 ár og Ester 4 ár.

Lesi til námsfrøðing á 4. ári á Føroya Læraskúla. Eg havi, meðan eg eri undir útbúgving, valt at raðfesta familjuna og lesturin fremst. Havi annars verið sera virkin, bæði innan samkomuna »Evangeliihúsið«, og í Miðflokkinum sum valevni til løgtings og býráðsval. Havi sitið í ymiskum nevndum, m.a. UfM, Landsnevndini hjá Miðflokkinum og PolUng. Eitt skeið var eg limur í skúlastýrinum fyri Argja skúla.

Síðani eg var heilt ung, havi eg havt áhuga fyri samfelagsviðurskiftum. Tað var ongantíð ivaspurningur fyri meg, um Miðflokkurin skuldi vera mín politiski flokkur, ella tá eg bleiv biðin um at gerast valevni. Tað, at stevniskrá Miðfloksins byggir á sama grundvøll, sum eg havi bygt mítt persónliga lív á, ger at hetta er ein flokkur, sum eg síggi sum eitt virðiligt umboð fyri meg á Løgtingi. Eg kenni meg trygga við Miðflokkin, tí í týðandi málum veit eg, hvar eg havi flokkin.

Miðflokkurin verður ofta lýstur í miðlunum sum ein heldur neiligur flokkur, men eg haldi, at stevnuskrá Miðflokksins er ein tann mest jaliga. Hon byggir m.a. á umsorgan fyri næstanum, familjuna sum hornastein undir samfelaganum, umframt tey kristnu lívsvirðini.

### Visti tú, at:

- **Løgtingið á vári 2005 feldi eitt fullfíggjað uppskot frá Miðflokkinum um skúlalæknaskipan!**
- **Í grannalondum okkara verða fyribyrgjandi heilsukanningar av skúlabørnum og ungum mettar millum fremstu fyribyrgjandi tiltøk, ið kunnu veitast komandi ættarliðum!**
- **Hóast ótaldar áheitanir frá Miðflokkinum letur Landsstýrið standa til og frátekur føroyskum børnum ta trygdina, sum læknakanningar í barna- og ungdómsárum vildi givið teim!**

www.midflokkurin.fo

## Statoil Føroyar
### søkir skrivstovunæming

Til høvuðsskrivstovu okkara í Tórshavn, verður søkt eftir skrivstovunæmingi.

Umsøkjari við FHS ella HH prógvi hevur fyrimun. Vit vænta okkum ein næming, sum er fyrikomandi, er vanur at arbeiða við teldu, hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit bjóða eitt lærupláss við fjøltáttaðum uppgávum og góðum arbeiðsumhvørvi.

Í lærutíðini fært tú upplæring innan alt vanligt skrivstovuarbeiði og kemur eisini at hava nakað av sambandi við Statoilstøðir.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Rasmus Joensen tlf. 34 35 00.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum og møguligum ummælum er 31. august 2007.

Umsóknir verða at senda til:
P/F Statoil Føroyar
Postboks 3098
FO-110 Tórshavn
Att. Rasmus Joensen

*Endmálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum kring landið oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil Føroyar arbeiða uml. 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og bestu tænastu.*

*Umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.*

STATOIL




LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

## Tvørøkis eftirútbúgving í psykiatri

Psykiatriin í Føroyum er í støðugari menning. Heildarpsykiatri hevur m.a. við sær broyttar karmar fyri viðgerð, ið krevja nýggjar arbeiðshættir og ikki minst nógv samstarv við skipanir uttan fyri psykiatriska depilin. Í tí sambandi skipar Psykiatriski depilin saman við »Uddannelseafdelingen, Psykiatrien i Århus Amt« fyri eftirútbúgving innan psykiatri

**Málbólkur**
Røktarar, heilsurøktarar, pedagogar, lærarar, sjúkrarøktarafrøðingar, ergo- og fysioterapeutar, sosialráðgevar og onnur, ið arbeiða ella fara at arbeiða innan hospitals-, økis- ella sosialpsykiatri.

**Mál fyri útbúgvingini:**
Tvørøkis eftirútbúgvingin hevur til endamáls at geva luttakarunum møguleika fyri at dagføra vitan og arbeiðshættir sum heild innan psykiatriska økið, at økja um kompetansuna hjá tí einstaka skeiðsluttakaranum og at fáa innlit í og amboð til at arbeiða tvørtur um fakmørk og ráðsøki.

**Skipan og bygnaður**
Eftirútbúgvingin fevnir um 60 skeiðsdagar svarandi til 12 modul á 5 dagar á 6 tímar og fer fram í tíðarskeiðinum vika 41 í 2007 og endar umleið viku 42 í 2008 við eini próvtøku, íð gevur atgongd til diplomútbúgvingar. Kostnaðurin er 39.800 kr, sum kann gjaldast í tveimum.

**Minstukrøv fyri skeiðsluttøku**
- royndir at arbeiða við sálarsjúkum og/ella áhugi fyri at arbeiða við hesum málbólki
- áhugi fyri at menna seg fakliga og persónliga
- áhugi fyri fakligari kunning, skrivliga og munnliga
- áhugi fyri at fara í djúpdina við ávísum spurningum í verkætlanararbeiði

Nærri upplýsingar um útbúgvingina fáast við at venda sær til deildarleiðara Ænu Reinert á tlf. 304500 lok 4170 teldupostur: ana.reinert@lsh.fo

Tilmelding í seinasta lagi 4. septembur 2007.
Tilmeldingin er bindandi.

**Alt rør- og ventilatiónsarbeiði verður gjørt skjótt og væl**



**MST-RØR** Tel. 507003